Summar FESTIVALUR - har hittini hittast



# FESTIVALTÍÐINDI
við Ragnhild Ellingsgaard



Summarfestivalur 2009:

# Kamping, tjalding ella rullandi dekk?

**Droymir tú um at vakna upp til túnatos, barnaspæl og angan av nýbryggjaðum kaffi, sum stendur og bíðar uttanfyri hurðina? Ella ert tú ein av teimum, sum vil vakna upp í eini heitari song og við gardinum fyri vindeyguni? Ella kanska vilt tú vakna í einum dúnvátum soviposa, meðan timburmenninrnir frá náttini gera klárt til at smíða hús inni í knokkinum á tær? Á Summarfestivalinum hevur tú møguleika til alt hetta, tí gistingarmøguleikarnir eru fleiri í tali og gerast tilboðini bara betri og betri fyri hvørt ár. Árið nú er einki undantak í so máta – men tað er at skunda sær eitt sindur, um tú ætlar tær at kampa, at sova í tjaldi ella á einum rullandi dekki í døgunum fra 6. til 8. august.**

GISTINGARMØGULEIKAR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Síðani fyrst í januar mánaða hevur telefonin á Kunningarstovuni kimað dagliga við fyrispurningum um gistingarmøguleikar í sambandi við Summarfestivalin. Tey hava ábyrgdina av hesum økinum og kunnu longu nú – ein góðan mánaða áðrenn slagið skal standa – staðfesta, at eftirspurningurin eftir gistingartilboðum er alsamt vaksandi.

- Í ár kunnu vit bjóða gestunum fleiri møguleikar. Vit hava bátapláss, eitt stórt kampingpláss, fleiri tjaldingarpláss, eitt vallaraheim og eisini summarhús at bjóða gestunum, greiðir Maiken Steinberg, leiðari á Kunningarstovuni, frá og leggur afturat, at umstøðurnar bara gerast betri og betri fyri hvørt ár.

- Til dømis kann eg longu nú avdúka, at serliga nógv verður gjørt burtur úr kampingplássinum, sum liggur beint aftanfyri stóra pallin. Vit gera sjálva útfyllingina á vágni um til eitt stórt veitsluøkið, har pláss er fyri allari familjuni – eisini teim smáu børnunum. Her hevur tú bara eitt lítið hanalgleiv til sjálvt festivaløkið og hevur kampingplássið verið serstakliga væl umtókt tey árini, vit hava royni hetta. Í ár fara vit so at gera serliga nógv burtur úr við fleiri spennandi tiltøkum, bæði fyri vaksin og børn, fortelur Maiken.

Kostnaðurin fyri eitt kampingpláss allar festivaldagarnar er 800 krónur og umsitur Kunningarstovan eisini eitt avmarkað tal av kampingvognum, um onkur hevur hug til at leiga ein sovorðnan.

Umframt kampingplássið kann Kunningarstovan eisini bjóða festivalgestunum eitt av teim bestu tjaldingarplássunum í Føroym. Hetta liggur úti í Grøv og hava tjaldarar atgongd til ein frálíkan køk og góða atgongd til bæði konufólka- og mannfólkatoilett.

Plássið varð sett av til tjalding fyri nøkrum árum síðani og er grivið soleiðis niður, at vindurin í stóran mun ikki rakar tjaldini. Her búleikast fyri tað mesta ung fólk, sum vilja hava tað stuttligt og av tí sama er eisini gott lív í á økinum døgnið runt.

Hevur tú familju er eitt annað tjaldingarpláss kanska rætta tilboðið til tín. Hetta liggur eitt sindur tættari við býin, so tað er styttri hjá børnunum at ganga til festivaløkið.

- Og ikki minst liggur hetta beint við Føroya største baðiland, beint við fótbóltsvøllin og eisini beint við eina stóra skateboardrampu. Hetta gevur børnunum framúr møguleika til at spæla saman og hava tað stuttligt, eisini uttanfyri festivalin, greiðir Maiken frá.

Afturat hesum tilboðunum ber eisini til at bíleggja sær eitt bátapláss ella at leiga sær eitt kamar á Vallaraheiminum, sum nú eisini liggur undir Kunningarstovuni.

- Bátaplássini eru altíð væl umtókt, so her loysir tað seg at koma í góðari tíð, tí bestu plássini fara sjálvandi fyrst. Men ynskir tú eina heita song, so eiga vit hana á Vallaraheiminum, har vit hava ein góðan sovisal og eisini einkul- og dupultkømur at bjóða gestunum. Her fært tú eisini eina stóra uppihaldsstovu, ein góðan køk og super toilettviðurskifti við brúsum og øllum, ið har til hoyrir. Plássini á Vallaraheiminum ganga tó sum heitt breyð longu nú, men enn eru nøkur fá pláss eftir, fortelur Maiken.

Um okkurt av hesum kundi verið nakað fyri teg, so ber til at ringja til Kunningarstovuna í Klaksvík á telefon 456939 ella skriva ein teldupost til info@klaksvik.fo fyri at frætta meira.

# Villingardalsfjall - Eitt føroyskt Mount Everest

Tað eru ikki bara føroyingar, sum koma á Summarfestival. Á Kunningarstovuni í Klaksvík siga tey, at talið av ferðafólki, sum koma til Klaksvík á festivalinum, er alsamt vaksandi hvørt ár.

- August mánaður er kanska eitt sindur deydligur nógva aðrastaðni, men tá hava vit bæði Summarfestival og Sjómannadagar í Klaksvík. Hetta eru tvey rættiliga ymisk tilboð við mótsetningum, tí á festivalinum upplivir tú ein internationalan anda við útlendskum tónum, meðan Sjómannadagurin er meira tradionellur og tengdur at teim gomlu, føroysku virðunum, greiðir Maiken Steinberg, leiðari á Kunningarstovuni, frá.

Hetta hava ferðastovur aðrastaðni eisini lagt merki til og er talið av útlendskum gestum í Klaksvík seinastu summarhálvuna bara vaksandi.

Kunningarstovan hevur fleiri tilboð á skránni til hesi ferðafólk og eru tiltiknu gongutúrarnir eitt av teim mest vælumtóktu tilboðnum. Sunnudagin beint eftir festivalin verður skipað fyri einum gongutúri niðan á Villingardalsfjall – ein túrur, sum Maiken kallar eina rættiliga avbjóðing.

- Hetta er ein kulur túrur niðan á eitt føroyskt Mount Everest. Allir føroyingar við brúk fyri eitt sindur av spennandi upplivingum burdu komið við á túrin, tí hetta er sjálvrealisering á hæsta stigið. Túrurin er eitt sindur avbjóðandi, men tað strævna verður gloymt, tá tú stendur á toppinum og kanst njóta eitt vilt imponerandi útsýni, heldur Maiken.

Við á túrinum verður ein staðkend guide, sum eisini fortelur áhugaverdar søgur um støðini, gingið verður framvið og komin oman aftur á slætt verður borðreitt við eini góðari máltíð.

Til ber longu nú at tryggja sær pláss á túrinum við at venda sær til Kunningarstovuna í Klaksvík á telefon 456939 ella við telduposti á info@klaksvik.fo.

**Við spurningum í lummanum hittir Ragnhild Ellingsgaard hvønn dag nýggj fólk á gøtuni. Í dag er tað Beinta Klakstein frá Klaksvík, sum stendur fyri skotum. Beinta er 30 ára gomul, námsfrøðingur og hevur verið á SF øll tey undanfarnu 5 árini**



**1. Hvør hevur verið tín stuttligasta uppliving á SF?**
*At standa í eini langari kø til w.c.'ini er ongantíð stuttligt – og so slett ikki á einum festivali. At finna alternativar loysnir kann hinvegin verða rættiliga stuttligt. Hetta hevur í øllum førum givið mær og vinkonunum fleiri láturkrampar gjøgnum árini.*
*Ein onnur stuttlig uppliving var at fáa fatur á eini av teim einans 200 t-shirtunum, sum Straight Ahead høvdu prentað til framførsluna í 2005. Tað var ikki bara sum at siga tað, men eftir áhaldandi veiði og fleiri telefonsamrøður endaði eg við at fáa eina frá Dávur Winther, mentanarleiðara í Klaksvík. Glað var eg – og t-shirtin hevur verið óluksaliga nógv brúkt.*

**2. Hvør hevur verið tín besta tónleikaliga uppliving á SF?**
*Tað hevur uttan iva verið Straight Ahead á áðurnevndu framførslu. Mær hevur altíð dámt teir ótrúliga væl og vóru teir totalt kul. Eg stóð næstan fremst og helt, at teirra show var super. So ræðuliga kul, at gamlir gubbar enn kunna rokka uppá handan mátan! ;)*

**3. Hvør er orsøkin til, at tú ætlar tær aftur á SF í ár?**
*Eg gleði meg til nakrar hugnaligar dagar í Klaksvík saman við góðum fólki. Í veitsluhýri, sjálvandi. Hetta, saman við góðum tónleik,i kann ikki ganga galið..*

**4. Tjaldar tú ella svevur í ordiligari song, tá tú ert á SF?**
*Eg havi egna íbúð í Klaksvík, so eg sovi í míni song undir míni dýnu.*

**5. Hvønn gleðir tú teg mest til at hoyra á SF 2009?**
*Eg gleði meg mest til at hoyra tey føroysku nøvnini. Serliga Høgni Lisberg og Guðrið Hansdóttir verða spennandi at hoyra, meðan Hanus uttan iva verður góður sum altíð.*